# Foreldur og børn eru væl nøgd við Dagstovnin við Landavegin

12. februar fættist í Sosialinum, at Dagstovnurin við Landavegin var tann dagstovnurin í Tórshavnar Kommunu, sum lá niðast í nøgdsemiskanning frá mai 2009. Plaseringin er høvuðsniðurstøðan av kanningini, sum Tórshavnar Kommuna skipaði fyri.

Eitt síðstapláss er altíð keðiligt og kann lættliga verða tulkað neiligt. Hetta er tó ikki ein rímilig niðurstøða útfrá kanningini. Allir stovnar kláraðu seg frá sera væl til beint undir miðal. Kanningin gevur eina støðumynd frá mai 2009 útfrá tí góða triðinginum av foreldrum, sum valdu at svara spurnarblaðnum. Tað eru ymisk fólk á ymsum stovnunum, og hesi svara út frá teirra gerandisdegi fyri einum knøppum ári síðani. Tað er sera trupult at samanbera úrslitini stovnanna millum og tað var, sum skilst, heldur ikki ætlanin hjá kommununi.

**Trívast børnini á Dagstovninum við Landavegin?**
Um vit kunnu taka útmeldingarnar á foreldrafundinum á stovninum tann 17. februar fyri fult, so er Dagstovnurin við Landavegin ein góður stovnur, har børnini trívast og har foreldur kenna, at børn teirra eru í góðum hondum. Á foreldrafundinum, sum leiðslan bjóðaði inn til fyri at tosa um niðurstøðurnar í kanningini, vóru fólk samd um, at stovnurin virkar væl. Har eru dugnalig og eldhugað starvsfólk, børnini hava ein góðan og tryggan gerandisdag og sleppa at royna seg við fleiri spennandi verkætlanum.

Øll eru samd um, at tað altíð eru viðurskifti, sum kunnu gerast enn betri. Tað er ein felags uppgáva hjá stovninum og foreldrunum at fáa sett orð á tey viðurskifti, sum eiga at betrast, og syrgja fyri at fáa hetta gjørt.

**Garðurin ein áhaldandi trupulleiki**
Á fundinum var breið semja um, at uttanumøkið, sum hevur verið ein trupulleiki, síðani stovnurin lat upp í 2004, enn ikki er á einum nøktandi stigi. Her hava stovnsleiðsla og Foreldraráð áhaldandi lagt eitt stórt arbeiði í at fáa bøtt um umstøðurnar, hóast alt, alt ov lítla játtan. M.a. hava familjur á fleiri arbeiðsdøgum smíðað, málað, grivið og gjørt við, til tess at fáa børnunum nøktandi umstøður og avbjóðingar í garðinum. Hetta hevur alla tíðina verið gjørt av neyð og við tí ynski, at Kommunan fór at taka sína ábyrgd á seg og fór at seta neyðuga peningin og arbeiðsorkuna av til at fáa tingini í lagi.

Ein trygdarserfrøðingur hevur nýliga kannað øll uttanumøkini á dagstovnunum í Kommununi, og hann staðfesti, at tað vóru fleiri viðurskifti, sum ikki vóru í lagi. Kommunan hevur síðani givið boð um, at av trygdarávum skulu tað einans vera fólk frá Kommununi, sum seta upp leikur og annað í gørðunum. Á foreldrafundinum heittu foreldur á stovnsleiðsluna um at streingja enn meira á Kommununa um at fáa gjørt nakað munagott við garðin. Hetta lovaði leiðslan at gera við stuðli frá Foreldraráðnum.

**Er eitt stovnspláss við Landavegin aftaná summarfrítíðina eitt gott val?**
Eitt evni, sum nógv varð tosað um á fundinum, var, hvussu foreldur velja stovnspláss til síni børn. Fólk vóru ørkymlað av, at "skoðsmálið" hjá Dagstovninum við Landavegin í kanningini kann fáa fólk at velja stovnin frá, tá veljast skal millum stovnsplássini. Hetta er stórt spell, tí foreldrini meta sum áður nevnt, at talan er um ein góðan stovn, har børnini trívast og hava tað gott. Skotið varð tí upp at bjóða til Opið Hús, har fólk fáa høvi at koma at síggja stovnin og heilsa uppá børn, foreldur, starvsfólk og leiðslu á stovnunum. Hetta helt leiðslan verða eitt sera gott hugskot og fer tí at skipa fyri einum slíkum degi ein seinnapart í komandi viku. Hetta fer at geva fólki høvi til sjálvi at gera sær tankar og niðurstøður um stovnin, heldur enn at líta á eina anonyma nøgdsemiskanning ella metingar hjá øðrum.

Foreldraráðið fyri Dagstovnin við Landavegin vil við hesum viðmæla øllum, sum umhugsa eitt stovnspláss á hesum stovninum, at koma til Opið Hús tiltakið.

**Foreldraráðið**
*Rani í Líð, Svandis Rasmussen, Jóhan í Niðristovu, Annika Sølvará, Súsanna Simonsen, Andrias Hansen, Linda Karbech Rasmussen og Inger Enni Danielsen*

# Barometrið og termometrið

**HERI MOHR**



Fyri umleið 430 árum síðani uppfann ein italienari (ikki italiumaður) eitt tól, sum fekk heitið termometur: **termo** merkir nakað, sum hevur við varma ella temperatur at gera, og **metur** merkir tól til máting. Nøkur ár seinri uppfann ein annar italienari eitt tól, sum fekk heitið barometur: **baro** merkir lufttrýst. Hesi nøvn eru international, verða brúkt allastaðni, har danskt, norskt, svenskt, enskt, týskt, franskt o.a. verður tosað – eisini har føroyskt verður tosað, men tó við reservatión. Eftir øllum at døma er tað bannlýst at brúka heitið termometur og temperaturur í tí føroyska sjónvarpinum og útvarpinum og í skúlunum. Tað kundi verið stuttligt at sæð bílæt av so valdsmiklum persónum, sum ósmædnir lamskera tá føroysku tunguna ætlandi við teirri grundgeving, at termometur og temperaturur eru "danismur" við ongum heimarætti í Føroyum. Men hvussu kann tað so bera til, at barometrið er sloppið í tað føroysku orðabókina men ikki termometur og temperaturur? Og hví hava okkara fjølmiðlar útihýst varman í Føroyum? Hjá teimum er hiti í Føroyum 365 dagar um árið – og eingin varmi. Harragud, siga vit ikki 'kom og verm teg,' ella kunnu vit ikki týðum siga okkurt sálarleyst 'við ongum varma'? Og varmapúta er í flest øllum heimum.

Eitt av mínum mongu abbabørnum (7 ár) segði nú ein dagin við pápa sín: "Babba, er tað heitt í Grønlandi?" – "Hví spyrt tú um tað," spurdi pápin. "Tí, útvarpið sigur, at tað er hiti í Grønlandi," svaraði hesin skilagóði smádrongurin.

Frá fullum monnum – og frá børnum kunnu vit hoyra sannleikan!

Her í Havn var siður fyri nógvum árum síðani at heingja eina "stormkúlu" á eitt krosstræ á "fýrin" á Skansanum. Tað var illa hugsandi, at havnarmen fóru í fjørðin við teirra smáu útróðrarbátum, meðan kúlan var uppi á Skansanum. Og í Geil – á horninum millum Eiriks Jarlsgøtu og Kopargøtu – stóð eitt lítið hús við "nichu," har eitt barometur og eitt termometur vóru væl vard við glasi (lesiglasi?). Her hittust havnarmenn javnan. Teirra dagliga breyð var í Nólsoyarfirði, á turkiplássum (klippfiskur) og á trøðni (hoygging/mjólkin) – og veðrið ráddi fyri øllum. Termometrið og barometrið vóru neyðug tól í teirra dagliga lívi.

Í framkomnum samfeløgum er umráðandi ongantíð at missa tamarhald á samfelagsins fíggjarviðurskiftum. Tað er neyðugt, at landsins gríma liggur í sterkum og tryggum hondum. Tey politisku amboðini til at røkja hetta týdningarmikla arbeiðið eru samfelagsins løggáva, herundir fíggjarlóg, sundurliðað í smálutum og samsvarandi hesi lóg sundurliðing av landskassaársroknskapum. Álítandi hagtøl er gott amboð í almennari fyrisiting, meðan óálítandi, kryptisk hagtøl eru skaðilig og hættislig amboð. Mentalur tryggleiki í politiskari fyrisiting: loyalitetur er sjálvsagdur.

Hetta eru samfelagsins barometur og termometur í fluttum týdningi. Hjá okkum er tað løgtingið og landsstýrið, sum ansa eftir landskassans baro og termo.

Sum kunnugt fingu vit heimastýrislógina 1. apríl 1948 og við henni landsstýri við eini trilvandi – eyðkenni fyri allari byrjan – meginfyrisiting, við sera góðari manning: tveir sýslumenn, hámentaður verkfrøðingur og ein skilamaður av Sandi, gott og roynt fólk, væl upplærd á amtskontórinum, fútakontórinum og dómarakontórinum, umframt nøkur fá serútbúgvin fólk frá statsministerinum. Og nakrir lógfrøðingar, sum høvdu fingið innlit í almennari fyrisiting á donskum ráðharrastovum. So við og við vaks tann almenna umsitingin orsakað av nýggjum økjum og nýggjum lógum, sum kravdu meira fólk. Tað tók løgtinginum 60 ár at økja fíggjarlógina frá nøkrum heilt fáum milliónum (13) til nakrar milliardir (5).

Í eina hálva øld eydnaðist tað løgtinginum og meginfyrisitingini (landsstýrinum) at hava tamarhald á landsins barometri og termometri, men so gjørdist alt truplari og fløkjasligt. Løgtingið misti tamarhald á lóggevingini, og her verður serliga hugsað um eitt ótal av lógum: landskassaveðhald, landskassaútlán, landskassastuðul, landskassatudning, upphøggingarstudning o.s.fr., sum innibar, at landskassin (løgtingið) noyddist at upptaka milliardalán í ymiskum londum.

Landskassans barometur var í permanentum lágtrýsti, og termometrið var læst fast á 41, til svullurin brast í oktober 1992 – tá stóð termometrið á 42!!

Í landskassans ársroknskapi 2008, síðu 250, er yvirlit viðvíkjandi løgtingsins ognum. Niðast í yvirlitinum er millum annað tilskilað, at "Gjaldstovan kann bara staðfesta, at hetta kravið – sum ásett í roknskaparkunngerðini – ikki verður fylgt, tí er ognaryvirlitið eins mangulfult sum undanfarin ár."

Tá ið løgtingið yvirtók skúlaverkið og almenna forsorg 1. januar 2002, fekk tað kostnaðarmiklar gávur frá stjórnini "under forudsætning af de bevilgende myndigheders tilslutning":

Føroya barnaheim
Dr. Ingridar barnagarð
Tekniskar skúlar
Skúlaheim
Føroya handilsskúli

Nú 9 ár eru liðin, eru hesar ognir ikki skrásettar í landskassans ársroknskapi. Vónandi hevur okkara myndugleiki ikki gloymt Føroya fólks vegna at takka fyri hesar stórfingnu gávur?

Í 1986 gjørdist meginfyrisitingin kaotisk. Nýggjar, fremmandar kreftir vístu seg á pallinum í Tinganesi, og royndir skrivstovustjórar vórðu koyrdir á síðuspor, og størv við ongum normeringum sóu dagsins ljós: ein multifrøðingur á hægstu rók, ymiskir frøðingar (6) fingu stjóraheiti, og fólk við ongari relatión til landsins umsiting fingu fulltrúastatus. Arbeiðsrutinur, sum skrivstovustjórin í Tinganesi og skrivstovustjórin á Føroya Gjaldstovu høvdu havt síðani 1948, vóru uttan orð og eið tikin frá teimum. Tann dugnaligi og dámligi skrivstovustjórin í landsstýrinum gavst um hetta mundi vegna aldur, meðan gjaldstovustjórin bað løgmann um at verða loystur úr embætinum, sum tá var mergsogið.

Tá ið landskassin fór á heysin í 1992, kom tað fram, hvussu álvarslig støðan veruliga var í landsins fyrisiting. Hon, fyrisitingin, og almenna fíggjarstøðan var tá so niðurundirkomin, at neyðugt varð, at fáa hjálp og ráðgeving úr Danmark, um okkara samfelag skuldi yvirliva.

Umráðandi var at byggja tað oyðuløgdu fyrisitingina heilt av nýggjum. Tað var tað, Norman Christensen varð biðin at gera. Men hvør slapp at betala rokningina fyri hetta umvælingararbeiðið? – Landskassin!

Harmiligt var tað tó, at skrivstovustjórin par excellence Johan Djurhuus ikki kundi vera saman við Norman Christensen í endurbyggingini av meginfyrisitingini, tí so hevði eitt og annað óivað verið eitt sindur øðrvísi í dag.

Hesar somu kreftir, sum forkomu eina annars vælvirkandi almenna fyrisiting, eru nú farnar at gera vart við seg. Tær tevja óivað nýval ella í øllum førum val í 2011. Og nationalistarnir í verandi samgongu tykjast at hugsa meira um fiktivt serføroyskt uttanríkisráð fyri 50 milliónir enn um trivnaðin hjá fólkinum í Føroyum. Álvaratos, man hetta ikki vera heimsins dýrasta táta so ruddiliga búgvin til Guinness? Ófatiligt, at javnaðarflokkurin og sambandsflokkurin ganga við til slíkt. Og kortini; alternativið er samgongan 1998-2003 – og tað er ræðandi.

Myrk skýggj eru á luftini. Bakbitið, sum Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri, fekk alment í bløðunum nú um dagarnar, er sera ódámligt. Tær destruktivu krefturnar frá 80-unum vita, hvussu almennir skrivstovustjórar skulu eliminerast.

Lat-meg-koma-upptrongdin er ikki lítil.